UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **9. oktober 2021**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08502-29**

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-045/2021 frá Eyðgunn Samuelsen, løgtingskvinnu, eftir § 52a í Tingskipanini, settur Jenis av Rana, landsstýrismanni í uttanríkis- og mentamálum. Um Sernám og menning hjá børnum.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Er tað framvegis Sernám, ið foreldur og starvsfólk á barnaøkinum skulu venda sær til, tá tey eru stúrin um menningina hjá barninum?

2. Er tað framvegis uppgávan hjá Sernámi at greina støðuna hjá børnum, um illgruni er um autismu, ADHD o.s.fr. og um neyðugt at ávísa barnið til psykiatriina til útgreining?

Svar

Til 1: Sambært Sernámi er mannagongdin í dag tann, at leiðsla í skúlum og á dagstovnum kunnu venda sær til Sernám umvegis sernámsfundir. Foreldur, sum hava barn í skúla ella á dagstovni, venda sær til skúlan/dagstovnin, um tey eru stúrin um eitthvørt. Skúlin/dagstovnurin kann síðani taka hetta uppá á sernámsfundi.

Er talan um lítil børn, ið enn ikki eru farin á dagstovn, er møguleiki hjá barnadeildini, kommunulækna ella heilsufrøðingi at seta seg í samband við Sernám.

Foreldur eru vælkomin at venda sær til Sernám, og fáa tey tá omanfyrinevndu kunning. Foreldur kunnu ikki bíleggja eina ávísa tænastu frá Sernám. Ráðgeving frá Sernám er altíð til skúla ella dagstovn, sum foreldur síðani beinleiðis ella óbeinleiðis fáa ágóðan av.

Til 2: Tað er primert uppgávan hjá kommunulæknaskipanini at greina støðuna hjá børnum, um illgruni er um autismu, ADHD o.s.fr., og um neyðugt at ávísa barnið til psykiatriina til útgreiningar.

Tó fekk Sernám fyri nøkrum árum síðani møguleikan at gera ávísingar til barna- og ungdómspsykiatriina, men tað verður altíð gjørt sum ein partur av eini tilgongd. Tað merkir, at Sernám saman við skúla/dagstovni altíð setur átøk í verk fyrst. Tí kann tilgongdin til barna- og ungdómspsykiatri gerast longri umvegis Sernám.

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður